Høgni Hoydal:

# Bjarni roynir at skapa trupulleikar

**– Tað hevði verið betri og lættari, um Bjarni Djurholm bara meldaði seg inn í Sambandsflokkin, sigur Høgni Hoydal, nú Bjarni Djurholm hevur meldað úr, at hann fegin sær ein loysn innanfyri ríkisfelagsskapin**

VALSTRÍÐ
*Heri á Rógvi*

Bjarni Djurholm hevur í fjølmiðlunum úttala seg um, at hann metir, at ríkisrættarligi spurningurin væl kann verða loystur innanfyri ríkisfelagsskapin.

– Vit eiga at fara burtur frá øsinginí um viðurskiftini millum Føroyar og Danmark – og í staðin skipa eitt samveldi millum londini, skrivaði Bjarni Djurholm m.a. í Sosialinum leygardagin.

Í sama blaðið var eisini ein grein, har fólkafloksmaðurin, Poul Michelsen, bjóðaði seg fram sum valevni við teirri treyt í einari samgongu, at full-veldistilgongdin sleppur at halda fram í einari samgongu.

Høgni Hoydal, formaður fyri Tjóðveldisflokkin, heldur ikki nógv um útsagnirnar hjá Bjarna Djurholm.

– Tað er eingin loynidómur, at Bjarni Djurholm ikki hevur verið samdur við fullveldisætlanini. Við hesum roynir Bjarni Djurholm at skapa trupulleikar, sigur Høgni Hoydal.

Formaðurin fyri Tjóðveldisflokkin sigur, at Tjóðveldisflokkurin heldur seg til gjørdar avtalur.

– Tað kann tykjast løgið, tí tað er Fólkaflokkurin, sum eigur uppskotið til tann leist, ið sjálvstýristilgongdin nú koyrir. Tað, ið Bjarni Djurholm sigur, gongur beint ímóti øllum tí, ið samgongan stendur fyri. Tað hevði verið betri og lættari, um Bjarni Djurholm bara meldaði seg inn í Sambandsflokkin, tí hetta, hann nú førir fram, liggur nógv tættari upp at Sambandsflokkinum enn nøkrum øðrum, sigur Høgni Hoydal.

Bjarni Djurholm hevur, sambært Høgna Hoydal, altíð vent sær nógv ímóti ætlanunum ímóti sjálvstýri. Høgni Hoydal ætlar sær at taka málið innanhýsis í samgonguni og ikki fara út í fjølmiðlarnar at kjakast um evni.



*Høgni Hoydal ætlar at halda áfram á somu leið, hóast Bjarni Djurholm hevur hug til at venda kós*

Alfred Olsen:

# Vendir øllum á høvdið

**– Bjarni Djurholm vendir øllum á høvdið við sínum útsagnum um samveldi við Danmark. Hann flytir seg rættiliga tætt upp at okkara nýskipanaruppskotið, sigur Alfred Olsen**

VALSTRÍÐ
*Heri á Rógvi*

Næstformaðurin í Sambandsflokkinum, Alfred Olsen, heldur tað vera undrunarvert, at Bjarni Djurholm nú kemur fram alment við tonkum um eitt samveldi við Danmark.

– Bjarni Djurholm vendir øllum á høvdið við sínum útsagnum um samveldi við Danmark. Tað er eingin ivi um, at hetta er valstríð, og Bjarni roynir við hesum at tekkjast teimum mongu fólkafloksveljarunum, sum eru sambandssinnaði, sigur Alfred Olsen.

Formaður í Javnaðarflokkinum, Jóannes Eidesgaard, fegnaðist í Sosialinum um, at Bjarni Djurholm kom við tílíkum útsagnum. Í so máta er Jóannes Eidesgaard ikki tann einasta at fegnast, tí Alfred Olsen heldur, at Bjarni Djurholm leggur seg heilt nær upp at nýskipanaruppskotið hjá Sambandsflokkinum.

– Eg haldi, at Bjarni við hesum leggur seg heilt nær upp at okkara uppskoti. Hetta skal tó fyrst og fremst metast sum eitt íkast til valstríðið, og tað er eingin ivi um, at Fólkaflokkurin við hesum roynir at leggja seg í miðjuna, sigur Alfred Olsen.

Næstformaðurin í Sambandsflokkinum metir tó ikki, at Fólkaflokkurin kann vera verandi í miðjuni, tí hesi seinastu fýra árini hava víst, at Fólkaflokkurin er loysingarsinnaður flokkur.

– Tað kann harafturat tykjast ógvuliga løgið, at Fólkaflokkurin fer í hernað móti sjálvstýristilgongdini, ið teir sjálvir hava staðið aftanfyri, sigur Alfred Olsen.

### Tulking

Alfred Olsen vísir á, at útsagnirnar hjá Poul Michelsen og tær hjá Bjarni Djurholm ikki heilt passa saman, og hetta kann tykjast ørkymlandi.

Poul Michelsen sjálvur heldur tó ikki, at tað er nakað serligur munur á hugsanum hjá partamonnunum í Fólkaflokkinum.

– Tað veldst um, hvussu tú tulkar orðini hjá Bjarni Djurholm. Eg meti, at hann hugsar um eitt framtíðarsamstarv millum tvey sjálvstøðug lond, og hetta er eisini ein áhugaverdur spurningur, sum eg heldur ikki eri ósamdur við, sigur Poul Michelsen.



*Alfred heldur talan vera um valstríð, nú Bjarni Djurholm er farin at tosa um samveldi millum Føroyar og Danmark*

## Sambandslistin í Norðoyggjum liðugur

UPPSTILLING
*Heri á Rógvi*

Sambandsflokkurin stillar sjey valevni upp til løgtingsvalið. Listin varð gjørdur liðugur á síðsta uppstillingarfundi, ið varð hildin mánakvøldið. Á listanum teljast nøkur kend nøvn. Borgarstjórin á Strondum, Eivind Jacobsen, og búskaparfrøðingur teljast millum nøvnini á valevnalistanum. Betta Joensen, ið hevur verið tann stóri atkvøðuslúkarin hjá Sambandsflokkinum í Norðoyggjum stillar ikki upp til løgtingsvalið.

Listin sær soleiðis út: Erikka Elttør, Klaksvík, Erlands Frederiksberg, Klaksvík, Eivind Jacobsen, Strendur, Hans Jacobsen, Klaksvík, Karl Olgar Joensen, Klaksvík, Magni Laksafoss, Klaksvík, og Absalon Matras, Norðoyri.

Karsten Hansen:

# Eg havi fult álit á Búskaparráðnum

**Eg eri púra ósamdur við tí, ið Bjarti Mohr sigur um Búskaparráðið. Ráðið ger eitt gott arbeiði, sigur Karsten Hansen**

BÚSKAPARRÁÐ
*Heri á Rógvi*

Tað var Bjarti Mohr, sum í Dagblaðnum vildi vera við, at Búskaparráðið ikki megnar at gera sína uppgávu til lítar. Hann vísti m.a. á, at Hermann Oskarsson, formaður fyri Búskaparráðið, hevði ført fram nakrar rættiliga, eftir hansara tykki, skeivar meiningar um fiskivinnuna í Føroyum, meðan hann fekk løn frá tí almenna. Ráðini frá Bjarta Mohr vóru, at Hermann Oskarsson skuldi stilla upp til løgtingsvalið, um hann legði í.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Karsten Hansen, hevur Búskaparráðið liggjandi undir sínum málsøki. Fyri stuttum varð ráðgevandinevndin fyri Føroyar spard burtur, tí mann ikki meinti, at tørvur var á nevndini longur, eisini tá hugsað varð um, at vit høvdu eitt Búskaparráð í Føroyum. Karsten Hansen er eisini glaður fyri arbeiðið hjá Hermanni Oskarssyni og hinum í Búskaparráðnum.

– Eg havi fult álit á teimum í Búskaparráðnum. Sjálvandi kann eg vera ósamdur við teimum viðhvørt, men tað er eisini ætlanin, at ráðið skal vera eitt óheft ráð, sigur Karsten Hansen.

Landsstýrismaðurin heldur fyri sovítt heldur ikki nógv um mátan, ið Bjarti Mohr velur at taka málið upp.

– Eg kann ikki siga annað enn, at henda staðiliga niðurgeringin av fólki, eins og hana Bjarti Mohr kemur við, er langt úti, sigur Karsten Hansen. Tá hetta stendur í Dagblaðnum, so má hatta verða roknað fyri at vera meiningin hjá Fólkaflokkinum.

Manningin í Búskaparráðnum skal ikki vænta at fáa sekkin frá Karsten Hansen fyrsta dagin.

– Bæði Hagstovan og Búskaparráðið hava gjørt eitt ótrúliga gott arbeiði tað tíðini, ið eg havi verið landsstýrismaður. Tað eru gjørdar uppgraderinagar, sum hava gagnað okkum sera væl, sigur Karsten Hansen.

Karsten Hansen heldur harumframt, at Hermann Oskarsson sum privatur persónur eigur at kunna siga sína hugsan um búskaparlig viðurskifti. Hann heldur tað bara vera positivt, um fólk koma við kritikki.



*Karsten Hansen er bara heilt glaður fyri sítt Búskaparráð*



ÚTSØLUENDABRESTUR
Hósdagin Fríggjadagin & Leygardagin
ALLAR ÚTSØLUVØRUR ENN MEIRA NIÐURSETTAR
Kallkyn
Vágsbotnur
Tel. 31 62 06

# 1076 ímóti Skálaborg



*Í gjár vórðu 1076 undirskriftir handaðar Jan Christiansen, borgarstjóra. Mótmælt varð ímóti bygninginum Skálaborg, ið uppskot er lagt fram um at byggja niðri á Skálatrøð*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Í eina tíð hava mótmælisbløð verið at sæð í teimum flestu handlunum í miðbýnum, og í gjár vórðu 1076 undirskriftir handaðar Jan Christiansen, borgarstjóra, sum mótmæli, at farið verður undir at byggja bygningin Skálaborg á Skálatrøð**

MÓTMÆLI
*Ingrid Bjarnastein*

– Vit mótmæla ikki bygninginum sjálvum, men vit mótmæla, at hann verður bygdur niðri á Skálatrøð, søgdu tær tríggjar kvinnurnar, sum í gjár handaðu Jan Christiansen tær 1076 undirskriftirnar.

– Vit halda ikki, at bygningurin hóskar inn í umhvørvið har niðri, og vit vilja eisini helst varveita parkeringsøkið, sum er har, tí hatta er einasta stóra parkeringspláss, sum fólk, ið skulu í miðbýin, kunnu brúka.

Tær tríggjar, Kirstin Hansen, Tóta Sørensen og Elspa Hardlei, umboðaðu í gjár 1076 havnaborgarar. Sagt varð millum annað, at hetta var teirra ábyrgd, sum havnafólk at gera vart við, at henda ætlan var ikki nakað, ið fall í góða jørð.

Jan Christiansen tók væl ímóti undirskriftinum. – Tað er ógvuliga gott hjá okkum sum politikkarar fáa eina slíka reaktión, tí soleiðis fáa vit eisini at vita, hvat rørir seg millum borgararnar. Á henda hátt uppdaga vit eisini, at borgararnir hava áhuga í miðbýnum, og tað er ikki annað enn positivt.

Borgarstjórin segði, at undirskriftirnar komu við á borðið tá verkætlanin varð førd víðari til byggideildina.

### Parkeringstrupulleikar

– Tað er ongin loyna, at miðbýurin hevur ein stóran parkeringstrupulleika, sigur Jan Christiansen. – Men henda verkætlanin var eitt uppskot, sum gjarna eisini skuldi tilført meira lív í miðbýin, soleiðis, at tað verður stuttligari hjá fólki at koma at keypa har.

Tikið varð eisini fram, at ein slík verkætlan førdi við sær, at fólk fóru at dyrka eitt mál, og nógv kundu hugsað sær, at fingið stóra parkeringsøkið niðri á Skálatrøð at sæð eitt sindur hugnaligari út. Pyntað eitt sindur um, soleiðis

– Bygningurin sjálvur er als ikki føroyskur arkitekturur og hann er eisini frammandur í okkara umhvørvi, sigur Jan Christiansen. – Hann hevði verið fyrst av sínum slagi í Føroyum, men ein tílík verkætlan staðfestir eisini aktivitetin í samfelagnum, og markerar ein tørv, sum er vaksandi og allarhelst eisini fer at vaksa meira.

Men undirskriftirnar verða tiknar til eftirtektar, og nú kemur bert framtíðin at vísa um teir 1076 borgararnir fáa teirra vilja ella ikki.



*Albert Isfeldt og Gudmund Hansen eru arkitetkarnir aftanfyri Skálaborg, ið nú verður mótmælt so harðliga ímóti*